## Høgni Klein av landinum

Høgni Klein, sum bleiv ársins spælari síðsta kappingarár, verður ikki partur av besta liðið hjá Kyndli undan jólum. Hann er farin til Danmarkar at arbeiða, og hetta er ein dyggur smeitur fyri Kyndil. Teir hava mist spælstýraran í álopsspælinum, og tí mugu fleiri av yngru leikarunum royna at lyfta spælið eftir Høgna.

Í Kyndli vóna tey tó, at Høgni Klein fer at hjálpa teimum í endaspælinum, og at hann tá fer at stýra Kyndli til enn eitt meistaraheitið.



ATLANTIC AIRWAYS HONDBÓLTUR MENN

### FAKTA – Kyndil menn

**Stovnað:** 1956
**Formaður:** Jóannes Dalsgarð
**Venjari:** Jónleif Sólsker
**FM-heiti:** 29

# Ungir leikarar við stýrisvølin

**- Vit hava mist nakrar týðandi leikarar, tí kann rutinan blíva ein trupulleiki hjá okkum í ár. Eg trúgvi tó, at okkara ungu leikarar kunnu føra Kyndil til enn eitt meistaraheitið.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hetta sigur Jónleif Sólsker, sum er nýggjur venjari hjá Kyndli. Jónleif hevur verið millum bestu leikararnar í Føroyum í nógv ár, men nú hevur hann valt at fara út um vøllin at stýra besta mansliði hjá Kyndli.

- Hetta dámar mær væl. Eg havi roynt tað fyrr, so tað er ikki endiliga nakað nýtt fyri meg. Eg eri spentur til uppgávuna, sum eg havi átikið mær, og haldi tað vera eina stóra avbjóðing at standa á odda fyri liðnum hjá Kyndli.

### Skjóta spælið skal varðveitast

Stóru styrkirnar hjá Kyndli síðstu árini hava verið ein sterk og kontant verja og skjótt álopsspæl. Hetta ætlar Jónleif at halda fast um, men hann ásannar, at hetta kann gerast truplari hjá Kyndli í ár, enn tað hevur verið undanfarin ár.

- Tað hevur altíð sermerkt Kyndil, at teir hava eina góða verju og skjótt álopsspæl. Hetta ætla vit sjálvandi at halda fram við, men tað fer at gerast meir trupult í ár. Vit hava mist fleiri leikarar, og millum annað Høgni Klein hevur spælt ein stóran leiklut í okkara álopsspæli. Har skulu vit finna ein nýggjan spælstýrara at taka yvir eftir Høgna.

### Ungu leikararnir skulu taka av møguleikanum

Kyndil hevur ikki bara mist Høgna Klein. Teir hava eisini mist Marius Joensen, Josef Abrahamsen og Jóhan Danielsen, sum allir vóru týðandi partur av kyndilsliðnum, sum vann meistaraheitið síðsta kappingarár. Jónleif heldur hetta sjálvandi vera ein stóran miss hjá Kyndli, men hann sigur, at ungir leikarar standa klárir at taka yvir.

- Høgni Klein verður vónandi aftur til endaspælið, men inntil tá mugu yngri leikarar stýra okkara álopsspæli. Hjalti, Rókur og Hanus eru tríggir leikarir, sum veruliga skulu standa sína roynd í ár. Hetta síggi eg tó ikki sum ein stóran trupulleika, tí eg trúgvi fult og fast upp á teirra evni á vøllinum.

Hann leggur afturat, at tað kann gerast trupult hjá unga liðnum at byrja við, men tað hevur stóran týdning, at teir ikki fáa eina alt ov vánaliga byrjan.

### Kyndil er ikki favorittur

Flest øll hava Kyndil sum stóran favorit at endurvinna meistaraheitið. Hetta er Jónleif ikki heilt samdur í.

- Eg dugi ikki at síggja, hví Kyndil skal vera favorittur. Vit vunnu meistaraheitið síðst, men vit hava mist nógv fólk síðani tá. Eg vænti, at kappingin verður hørð ímillum liðini í ár, og at tað eru fleiri lið, sum kunnu vinna meistaraheitið. Vit, VÍF og StÍF eru kanska størstu favorittarnir, men bæði KÍF og Neistin kunnu lættliga taka øll á bóli í ár.



*- Eg dugi ikki at síggja, hví Kyndil skal vera favorittur. Vit vunnu meistaraheitið síðst, men vit hava mist nógv fólk síðani tá. Eg vænti, at kappingin verður hørð ímillum liðini í ár, og at tað eru fleiri lið, sum kunnu vinna meistaraheitið.*

# Vit ungu skulu taka ábyrgd

**Kyndil hevur havt eitt gott ungdómsarbeiði, sum nú sæst aftur á besta liðnum. Hjalti Mohr Jacobsen er bara ein av fleiri stórum talentum, sum fara at manna besta manslið hjá Kyndli í ár**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kyndil er einasta lið í landinum, sum hevur spælt uttan útlendingar síðstu árini. Hjalti heldur ikki, at tað er skeivt at taka útlendingar til landið, men hann heldur, at Kyndil gjørdi rætt, tá teir valdu at geva egnum leikarum møguleikan.

- Ja, eg haldi so avgjørt, at Kyndil hevur valt rætt, tá teir valdu at satsa uppá egið fólk. Liðið er bert mannað av føroyskum leikarum, og hetta meti eg vera eina stóra styrki hjá okkum.

### Breiddin kann gerast ein trupulleiki

Kyndil hevur mist nógv fólk síðani teir vunnu meistaraheitið, og Hjalti heldur, at hetta kann gerast ein trupulleiki hjá liðnum.

- Fyrst mistu vit Jóhan Danielsen, Josef Abrahamsen og Marius Joensen. Hetta var ein dyggur smeitur fyri okkum. Men sum um tað ikki varnóg mikið, so fingu vit at vita, at Høgni Klein heldur ikki fór at spæla fyrrenn eftir jól, og hetta tók kanska enn harðari upp á okkum. Høgni var okkara spælstýrari, og tað verður ringt at útfilla hansara leiklut á liðnum. Við tí í huga, at vit hava mist so nógvar leikarar, so er tað klárt, at breiddin kann gerast ein trupulleiki, og tí verður sera týdningarmikið hjá okkum at fáa eina góða byrjan.

### Kyndil komi seint í gongd

Ein annar trupulleiki hjá Kyndli er, at teir eru komnir nakað seint í gongd, og hetta ásannar Hjalti eisini.

- Vit eru komnir nakað seint í gongd við venjingina. Nú hava vit endiliga fingið ein venjara, so nú hyggja vit fram ímóti kappingarbyrjan, og vóna, at hetta ikki fer at ávirka okkara spæl.

At enda sigur hann, at hann væntar sær eina javnari kapping enn undanfarin ár.

- Eg vænti, at fleiri av liðunum vera sera jøvn. H71 fer at fáa tað trupult, meðan øll hini liðini fara at berjast um fremstu plássini. Eg vænti mær eisini nógv av grannunum úr Neistanum, sum hava fingið eitt spennandi lið. Men eitt er sikkurt, sjálvt um Neistin og Tróndur Kragesten kunnu fáa okkurt gott úrslit, so vinna teir ikki meistaraheitið, ei heldur okkum í Kyndli.